# BØNARLØTAN

**Januar** **2012** **27. árg.**

***1. Sunnudagur*** ***5. Mós. 1,1-21***



*Kvinnan hevur ikki etið í fleiri dagar, men hevur nú fingið mat og klæðir til børnini – her saman við Katrini Mørkøre av Eiði.*



*Sigoynarabørn hava fingið lesnað.*

## RUMENIA

Birgir Andreassen: Farið er undir at byggja 9 møtisalir í bygdunum kring Tirgu-Jiu. Fyrsti salurin stendur nú liðugur; teir rúma 60 fólkum hvør og kosta uml. 30.000 kr. fyri hvønn. Ætlanin er at byrja skúla fyri sigoynarabørnum, og myndugleikarnir taka væl undir. Fullur treylari við vørum og jólapakkum er komin til Rumenia, tað mesta savnað í samkomum í Suðuroy og býtt út til fátæku sigoynararnar í Targu-Jiu.

**Bønarløtan ynskir øllum bønarvinum gott nýggjár við Sálmi 123.1: Til Tín lyfti eg eygu míni!**

## KRINGVARPIÐ:

| | |
|---|---|
| 8. jan. | Sjónvarpsandakt, Símin í Túni |
| 15. jan. | Sjónvarpsandakt, Símin í Túni |
| 29. jan. | Sjónvarpsmøti, Hebron, Argir |
| 5. febr. | Útvarpsmøti, Lívdin, Hoyvík |

## RÁS 2:

Sunnukvøld. . . . . . . . . . .kl. 21.00 . . . . . . . . . . .Kelduvaðið

*endursent hóskvøld kl. 21.00*

Týskvøld . . . . . . . . . . . . .kl. 21.00 . . . . . . . . . . .Á torginum

*endursent sunnudag kl. 12.30*

Í dag fyllir Ester Bech 12 ár.

## *2. Mánadagur* — *Matt. 1,1-17*



### ONGLAND, NTM North Cotes
### Erla og Ingvard Petersen, Símeon 16, Súsanna 14, Natan 8

Skúlin byrjar aftur 4. jan. Biðið fyri okkum og næmingunum. Ingvard undirvísir úr Ápostlasøguni.

## *3. Týsdagur* — *5. Mós. 1,22-45*

### FØROYAR
### Annika og Poul Færø

6. og 7. jan. kl. 20 og 8. jan kl. 18 hava Poul Færø, Jákup N. Olsen og Arni Simonsen møti í verkstaðnum „Bulur“ á Signabø.

### Birgit og Svenning av Lofti

Eg eri á vitjanarferð í Jútlandi 9.-16. jan. saman við Poul Færø.

## *4. Mikudagur* *Sálmur 119,1-22*



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus,**
**Ingrid Tove 15, Petur Gullak 13**

Vit biðja, sum skaldið Lina Sandell yrkir: „Gev, at ongin burt skal spilla náðina, sum árið ber!“ Sunnukvøldið 4. des. varð ein ung genta doypt á Malta. Vit gleðast um, at Harrin leggur nøkur afturat samkomuni. Farið verður til Aalborg 7. jan. og til Esbjerg og Vejle 14. og 15. jan.
**– Greta og Levi Joensen**

## *5. Hósdagur* *Matt. 1,18-25*



**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Vit eru á Filipsoyggjunum til 12. jan. á árligu samfelagsstevnuni. 20.-30. jan. hava vit fund í Florida við leiðarar hjá NTM kring heimin um tær mongu avbjóðingar, trúboðarar hava í hesum døgum.



**USA, North Carolina,**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vit eru so takksom fyri alt, Harrin hevur gjørt her í samkomuni og vilja fegin vera trúføst í nýggja árinum.

## *6. Fríggjadagur* *5. Mós. 2,1-15*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Mari og Janus í Løðuni,**
**Jógvan Karstin 3, Silja 1**

Silja er byrjað í vøggustovu, og Jógvan Karstin fer í barnagarð. Mari skal eiga mitt í jan. Vit hava fingið samband við onnur trúgvandi og royna at upplýsa um summarlegurnar. marifp_81@hotmail.com

**Marjun og Páll Poulsen**

Eg havi fingið samband við trúgvandi grønlendingar bæði í Qaqortoq og Nanortalik. Biðið, at eg kann vera teimum til hjálp og stuðul á leiðini.

## *7. Leygardagur* *Matt. 2,1-12*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi**
**Carol og Poul Joensen**
**Adrian Sean 17, Jonathan Daniel 11, Ísak 9**

Meðan vit vitja í Sorimi, byrja vit at læra úr 1. Kor. Umsetingarráðgevi kemur at kanna tilfarið, sum eg havi umsett. Biðið um góða framgongd við bíbliuumseting og at skriva bíbliutímar.

## *8. Sunnudagur* *5. Mós. 2,16-37*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eg eri nú liðug at umseta tey versini úr Gamla Testamenti, sum skulu nýtast til bíbliutímarnar. Takk fyri forbøn. Eg umseti nú brot úr evangeliunum og Ápostlasøguni. Tilfarið má gerast klárt, so vit kunnu byrja at undirvísa skjótt. Erik fyrireikar bíbliutímarnar. Badiaranke skúlin byrjar aftur nú í jan. Biðið fyri lærarum og næmingum, at teir eru ídnir og áhaldandi. Í dag fyllir Ragnhild Sharp 8 ár.

## *9. Mánadagur* *Matt. 2,13-23*



**DANMARK,**
**Keypmannahavn, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein,**
**Sigrid 4, Andreas 2, Kristina 0**

Fitt av fólki kom til møtini farna heyst, og vit gleðast um mong ung lesandi, sum vísa stórt trúfesti í tænastuni. Tað er stimbrandi, at tit har heima velja at koma til møtini, tá tit koma í sjúkraørindum ella vitja familju og lesandi. Møtini eru fríggjakvøld kl. 20 og sunnudag kl. 11.



**DANMARK, Keypmannahavn**
**Susan og Øssur Berghamar**

Vit eru takksom fyri at vera við í verkinum millum føroyingar í Kristnastovu og at vera nakað fyri fólk í sjúkraørindum. Vit eru eisini fegin um gott samband við fastbúgvandi útisetar, sum vit hava lært at kenna, og ynskja at halda fram, so leingi Harrin vil.

## *10. Týsdagur* *5. Mós. 3,1-14*

**OM, Logos Hope**
**Jón og Katrin Helmsdal, Klaksvík, Fríðrikur 3, Ingi 1**
Vit eru í Cebu á Filipsoyggjunum frá 10. jan. til 14. febr., tá leiðin ber til Manila. Ætlanin var at koma heim síðst í jan., men vit hava avgjørt at vera umborð tveir mánaðir afturat.

**Jacobina og Hjalmar Andreasen, Eiði, Theodor (0)**
Vit fara hálvan jan. á Go-stevnu í Týsklandi í 14 dagar og síðan til Cebu til aðrar venjingar og undirvísing í 14 dagar. Vit fara umborð á Logos Hope um hálvan febr. at verða í tvey ár. Hjalmar skal arbeiða sum maskinmeistari.

## *11. Mikudagur* *Sálm. 119,23-46*



**DANMARK, Kongens Lyngby,**
**Jan og Anne Zachariassen**
Biðið, at tey deyvu eisini hoyra evangeliið og fá undirvísing at tæna, sum Harrin kallar. Eg fari til Italia á stevnu 20.-25. jan.

**DANMARK,**
**Ruth og Valdemar Lützen, Anton 11, Markus 7**

**DANMARK, Glostrup Frikirke**

## *12. Hósdagur* *Matt. 3,1-17*

### ONGLAND, Birmingham, OM
### Claire og Craig Niclasen, Elizabeth 5, Rebekah 3, Lydia 1

Vit eru takksom fyri túrin hjá Craig til Kurdistan herfyri. Tað hevur hjálpt, tí nú er lættari at hava samrøður við kurdar.

### ONGLAND, NTM North Cotes
### Liz og Ragnar Niclasen

Liz og eg fara til Filipsoyggjarnar seinnu helvt av jan. í 3 vikur at vitja tey trúgvandi í bydgini Lenga, har vit virkaðu í 11 ár. Endamálið er at undirvísa úr Hebrearabrævinum. Hetta er mítt hjartans ynski, men biðið, at eg skal klára meg málsliga, tí eg havi ikki tosað hetta málið í fleiri ár.

Í dag fyllir Olivia Hansen 16 ár.

## *13. Fríggjadagur* *5. Mós. 3,15-29*

### ONGLAND, Cornwall
### Anna og David Rodda, Charlton Eivind 16

Anna hevur fingið betri hjálp av heilivági frá Richard Schwartson enn av øðrum heilivági. Kortini tykist rørsluførleikin viðhvørt at vera verri, men Anna er tó før fyri at stimbra onnur, sum hava aðrar trupulleikar. Charlton trívist og lærir eina rúgvu í skúlanum. Dubby heldur á at bera boðskapin á netinum. Pastorurin Musa, sum lærir saafi-fólkið í Senegal Orð Guds, er eisini boðin at undirvísa í aðrari bygd.

## *14. Leygardagur* *Matt. 4,1-11*

**GRØNLAND, Nuuk,**
**Jonna og Hans Sivertsen**
Okkara størsti tørvur er forbøn. Vit takka tykkum, samkomum og einstaklingum, sum trúliga biðja fyri Harrans verki í Grønlandi. Biðið, at Harrin gevur okkum vísdóm og andaligt innlit.

## *15. Sunnudagur* *5. Mós. 4,1-24*



**FØROYAR,**
**Else og Poul Johan Djurhuus**
Takk fyri, at tit hava staðið saman við okkum í 2011 í bøn, áminning, troyst, eggjan og fíggjarliga.

**Vanja og Svein Petersen, Jenny 4, Svend 3**
Túrurin í Danmark við evangeliinum var ein rík tíð. Vit vænta at vitja samkomur norðanfjørðs í vetur. Seinast í apríl vænta vit eitt barn afturat
**– Anna Maria og Rógvi Joensen, Karl 15**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, 11, Agnas 9, Boas 4**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Maria og Jens Bech, Ester 12, Jan 9**

## *16. Mánadagur* *Matt. 4,12-25*

**Rutt og John í Skemmuni**
Zareptalegurnar verða nú fyrireikaðar. Eg havi vitjað nakrar samkomur og vil fegin vitja nakrar afturat.
**– Lis og Zacharias Zachariassen**

## *17. Týsdagur* *5. Mós. 4,25-49*

**RUSSLAND, Moskva**
**Guðrun og Ivor Tutty**
**Daniel 15, Sonja 13, Timothy 13, Karina 10**

Minnist toymið í Horinsk, lítlari bygd har eysturi í landinum, sum roynir at vísa íbúgvunum á vón í andaliga myrkrinum. Fólk har eru sera fátøk, misnýtsla er vanlig, og nógvar familjur hava trupulleikar.

## *18. Mikudagur* *Sálm. 119,47-69*



**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen, Noah 9**

Tit hava stóran leiklut í verki okkara, sum hóast seint støðugt gongur framá. Samkoman La Fonte, sum vit eru í ferð við at stovna, er enn lítil, men vit gleðast um, at fleiri og fleiri vísa boðskapinum áhuga og nærkast krossi Kristusar.

## *19. Hósdagur* *Matt. 5,1-16*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett,**
**Hannah 16**

Vit hava nú verið í Turkalandi í góðar 2 mánaðir og eru glað um at endurnýggja vinabond her.

## *20. Fríggjadagur* *5. Mós. 5,1-16*

**PAPUA NÝGUINEA, Lapilo (f)**
**Rachel og Peter Hansen,**
**Daniel 14, Allan Steffan 12, Caleb 9**

Biðið, at heilsan hjá Davidi og Karli skal batna, og at báðir finna arbeiði. Vit eru í farloyvi og royna at vitja samkomur her í USA.

**Wina og Benjamin Hansen,**
**Noah Elias 0**



Vit fyrireika okkum at fara til Papua Nýguinea, men okkum tørvar innfarar- og uppihaldsloyvi. Vit hava framløgur her í Týsklandi í ymsum samkomum um okkara komandi tænastu.

**Philip Hansen**

Eg haldi á at arbeiða fyri at hava møguleika at fara til Papua Nýguinea sum trúboðari. Biðið um styrki og vísdómin at tosa við fólk um verkið í PNG.

## *21. Leygardagur* *Matt. 5,17-32*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca, Inga McKendry**

Fleiri vísa áhuga fyri Jesus-filminum frá Lukasar evangeliinum. Bøn mín er, at tey taka ímóti boðskapinum. Minnist eisini arbeiðið við Ph.D-ritgerðini. Framgongd er í arbeiðnum við mixtec umsetingini, men okkum tørvar vísdóm at umseta.

**FRAKLAND, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen, Sarah 0**

## *22. Sunnudagur* *5. Mós. 5,17-33*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**



Minnist tey 215 börnini og ungdómarnar á Ástjörn síðsta summar og starvsfólkini. Biðið eisini fyri samkomuni Akrinum í Kópavogi; møti er sunnudag kl. 14. Irene Gook frá Akureyri, dóttir Arthur Gook, er 102 ára gomul og sjúk.



**NIGERIA, Ankpa,**
**Shino og Hallur Mortensen, Kano 2**

**SERBIA, Kursara**
**Jórun og Kalli Jacobsen**



**SKOTLAND, Motherwell,**
**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**

## *23. Mánadagur* *Matt. 5,33-48*

**GRØNLAND, Kuummiut**
**Miriam og Niels Vang, Jóhan 16, Lydia 13, Kezia 11**

Vit hava vitjað nakrar samkomur, kvinnumøtir og bønarbólkar og ætla at halda á. Vit mugu taka rættar avgerðir viðvíkjandi tænastuni komandi árini, t.d.. um vit beinanvegin skulu fara aftur til Eysturgrønlnds ella bíða nøkur ár, meðan børnini ganga í skúla.

## *24. Týsdagur* *5. Mós. 6,1-25*



**ZAMBIA, Ndola,**
**Nanna og David Lukama**
**Josiah 7, Micah 4, Ezra 3, Uhenya 0**

Vit eru sera takksom fyri tíðina í Føroyum. 170 ung vóru á legu her í des. Meira enn helvtin fyrstu ferð. Paul, ungur maður úr Avstralia, er komin at arbeiða saman við GLO-alive í ein mánað. Biðið fyri Chikumbi, John og Patrick, ið eru ungir menn, sum hava arbeitt í urtagarðinum hjá okkum, men nú eru byrjaðir fyri seg sjalvar við hjálp frá GLO-alive.



**GRØNLAND, Juvel II,**
**Anna og Óli Steinberg**
**– Cecilia og Jonhard Poulsen (fj.a.)**

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen, Eli 6**

**Grace School,**
**Grace og Leivur Ragnarsson**

## *25. Mikudagur* *Sálm. 119,70-92*



**FØROYAR, Shamila og Høgni**
**Johannesen, Joy 9, Adonia 3**

Vit takka fyri, at Adonia kann byrja aftur í barnagarði seks tímar um dagin. Biðið fyri trúarverjubólkunum, sum vónandi byrja skjótt. Vit kanna møguleikarnar at byrja summarskeið í trúarverju í Onglandi. Skeiðið varir í 10 dagar.

## *26. Hósdagur* *Matt. 6,1-15*

**DANMARK, Esbjerg (f)**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Hannah 12, Eva 11, Miriam Joy 8, Noah 5**
Vit eru fallin væl til í Esbjerg, børnini trívast, og vit uppliva endurnýggjan. Nú fari eg at vitja samkomur í Danmark at tala og fortelja um OM.

**GUINEA VESTURAFRIKA, Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Hannah 16, Andrew 15, Jens Allan 10, Ryan 2**

## *27. Fríggjadagur* *5. Mós. 7,1-26*

**KANADA, Good Seed International**
**Judith og Allan Ellingsgaard**
**Benjamin 7, James 5, Micha David 1**
Vit filma stutt innsløg at leggja við sum fløgu í bókini „By this Name“. Vit vóna, at tað styrkir bókina og ger boðskapin enn greiðari. Bókin er ætlað sum hjálp hjá fólki at greiða frá boðskapi Bíbliunnar.

**VENESUELA**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**



**Dania og Símin í Túni (fj.a),**
**Isabel 14**

Í dag fyllir Micah Lukama 5 ár.

## 28. Leygardagur *Matt. 6,16-34*

**FILIPSOYGGJAR, Mindanao, Anja Nielsen (f)**

Eg ynski at takka tykkum øllum fyri tíðina heima. Latið okkum biðja fyri hvørjum øðrum.

Adonia Johannesen fyllir 4 ár.



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp,**
**Ragnhild 8, Rebekka 6, Hanna 3**

## 29. Sunnudagur *5. Mós. 8,1-20*



**FILIPSOYGGJAR, Balabak, Bual**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Meginparturin av tíð okkara næstu mánaðirnar fer til at greiða umsetingina til prentingar. Hetta krevur bæði tol og nærlagni.

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Selma Godtfred, Heidi Vang, Durita Olsen, Kristianna J. Heinesen, Ása Ósá, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 312522.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 225558.
**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk

## *30. Mánadagur* *Matt. 7,1-14*

### OM, Anita og Oddmar Tausen, Jóhan 15, Dania 13

OM-Føroyar verður nú sjálvstøðugt við føroyskari nevnd við fíggjarligari ábyrgd. Vit hava játtað at taka við sum leiðarar. Okkum tørvar nógva hjálp, serliga umsitingarliga. Vit vóna at kunna seta eitt fólk í starv skjótast gjørligt. Eftir mong ár í framúrskarandi tænastu hevur Ruth Gaardlykke gjørt av at fara úr OM-leiðsluni. Vit harmast sjálvsagt, men stuðla henni í avgerðini. Hon vil framvegis fegin halga seg ungdómsarbeiðnum og aðrari tænastu í samkomuni Hebron á Argjum. Vit takka Ruth hjartaliga fyri hennara avrik í OM og TeenStreet.

### TeenStreet

Tilmeldingin er nú byrjað á www.teenstreet.fo. Biðið, at vit fáa góð hjálparfólk.

### Vitjanartúrur til Logos Hope

26. febr. til 2. mars fara vit við maskinmonnum at vitja Logos Hope. Meira um hetta á heimasíðuna hjá OM.

(v) = í venjing (f) = í farloyvi (fj.a) = fjararbeiðandi

**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayer@markirnar.fo
**Heimasíða:** www.markirnar.fo

**©KBS.**
*Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## *31. Týsdagur* — *5. Mós. 9,1-14*



*Tey ungu á veg til Soul Survivor festival í London.*



*Í sunnudagsskúla.*



## SVEIS, Nyon, Westlake Church, Jeanette og Solomon Magura

Westlake Church er 25 ára gomul ensktalandi samkoma nærhendis Geneve, sum er miðdepil hjá altjóða, diplomatiskum og humaniterum feløgum. Um 45% av íbúgvunum nærhendis tosa enskt. Mál okkara er at náa og tæna menniskjum í hesum sermerkta øki. Í jan. og febr. leiðir Solomon ein bólk frá samkomuni at kanna nýggjar leiðir at bera fólki boðskapin. Okkum tørvar einleika og vísdóm. Jeanette (f. Ottosen) er úr Havn, Ebenezer, og Solomon úr Zimbabwe. Hann er pastorur í samkomuni, sum telur um 200 fólk frá 20 ymiskum tjóðum. jeanette_ottosen@hotmail.com.